# Klandursskrímsl

Rithøvundar: Áslaug Jónsdóttir, Kalle Guttler, Rakel Helmsdal (Island/Føroyar)
Myndprýðari: Áslaug Jónsdóttir (Island)
Mál og menning, 2012

Í uppskoti til Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2013




ISBN978-952-7572-70-2

Søgugongd: Stóra skrímsl og Lítla skrímsl klandrast um, hvat tey skulu spæla. Støðan batnar ikki, tá Lítla skrímsl fer at flenna at Stóra skrímsli, sum dettur og fær ilt.

Evni: klandur, vinalag, iðran, skuldarkensla, semja

## Samrøða og virksemi:

### Hygg og les við teimum allaryngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørjar spennandi smálutir finna tit?**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at forsíðuni. Hvat halda tit, at bókin snýr seg um?**

**2. Hvat fær øði í Lítla skrímsl?**

**3. Hvussu kennist tað, tá tú hevur gjørt okkurt skeivt?**

**4. Hevur tú nakrantíð klandrast við nakran? Hvussu gjørdust tit góðir vinir aftur? Hvussu verða Lítla skrímsl og Stóra skrímsl góðir vinir aftur?**

**5. Hygg at myndunum og finn síðurnar, har skrímslini klandrast. Hygg at síðu 6 og síðstu síðu í bókini og ger eina tekning av tær og tínum besta vini/vinum.**

### MIÐLINGAR

**1. Klandrast tú nakrantíð við onnur? Hvat klandrast tit um? Hvussu hevur tú tað við at klandrast? Tosið saman í flokkinum um, hvussu tit verða góðir vinir aftur.**

**2. Hevur tú nakrantíð sagt okkurt við onkran, sum tú síðani hevur angrað?**

**3. Øllum dámar at spæla ymiskt onkuntíð. Er tað í lagi, at tann eini altíð ger av, hvat tit skulu spæla? Hvussu loysa tit ósemjuna um, hvat tit skulu spæla? Nevn tvey hugskot til, hvussu til ber at loysa eina ósemju.**

**4. Tosa við vin tín um tíni yndisspøl. Dámar tykkum at spæla tað sama? Hvør ger av, hvat tit skulu spæla?**

**5. Nýt huglagið og andlitsbráini í bókini til at gera eina kreativa uppgávu við mynd og teksti, har Lítla skrímsl biður um umbering.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Lesið bókina saman tvey og tvey og haldið eyga við, hvussu bókstavirnir broytast í støðd. Haldið eisini eyga við, hvussu veðrið skiftir í bókini. Hvønn leiklut spælir veðrið í søguni?**

**2. Ert tú nakrantíð komin til at siga ella gera nakað, sum hevur gjørt ein annan keddan? Hvussu gjørdust tit góðir vinir aftur? Hvussu kendist tað? Merkti tú tað í kroppinum við til dømis búkpínu sum Lítla skrímsl?**

3. Í ringasta føri: Lítla skrímsl ímyndar sær alt tað ringasta, ið kann henda, eftir at hann hevur givið Stóra skrímsli eitt blátt eyga. "Hvat um hann doyr?" hugsar hann. Hevur tú nakrantíð havt tílíkar tankar? Hvussu kann ein steðga sær sjálvum í at hugsa so? Hevði tað hjálpt at tosa við onkran um tað?

4. Tosið saman í flokkinum um at vera góðir vinir og at gerast góðir aftur, tá tit hava klandrast. Hvussu hevur tú tað við at siga orsaka?

5. Finn eina mynd í bókini, sum tú kanst nýta sum íblástur til eina kreativa uppgávu. Til dømis pappírs-klipp, ein málning ella ein stopmotionfilm.

**LES EISINI:**

**Strikurnar eftir Dánial Hoydal og Annika Øyrabø**
**Neyðars skrímsl eftir Áslaug Jónsdóttir, Kalle Güettler og Rakel Helmsdal**
**Vildare, Värre, Smilodon eftir Minna Lindeberg og Jenny Lucander**

## MÁLBITIN

# "Klandur"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendsk | finskt | norðursámiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bråka** | **Skændes** | **Krangle** | **Rífast** | **Klandur** | **Oqqanneq** | **Riidellä** | **Riidalit** |



Deilið myndir av tykkara lesiløtum við **#nordiskabokslukaren**!